# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*»Veruleikin er, at tað er lættari at fáa sjálvræði við sambandsflokkinum í samgongu, enn við tjóðveldisflokkinum«*
*Anfinn Kallsberg*

# Fáa kanska størri skip – men ikki enn

**O.C. Joensen á Oyri vil hava annað og størri skip fyri skeljatrolaran Norðheim. Sum er forðar lógin tí, men ein loysn er kanska á veg**

FISKIVINNA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*O.C. Joensen vil hava annað og størri skip fyri 40 ára gamla Norðheim.*

Seinastu nógvu árini hevur Norðheim dreggjað eftir skeljum til skeljavirkið hjá O.C. Joensen á Oyri. Men nú er skipið 40 ára gamalt og ikki tíðarhóskandi longur. Tí hevur reiðaríið søkt fiskimálaráðið um loyvi at skifta skipið út og at keypa annað og størri skip ístaðin fyri.

Men tað fær reiðaríið ikki loyvi til. Fiskimálaráðið hevur svarað, at felagið kann keypa annað skip, men tað skal ikki vera størri í rúmmetrum enn Norðheim, tí soleiðis er lógin orðað. Hon heimilar bara landsstýrismanninum at gera frávik, tá talaner um uppisjóvarskip, rækjutrolarar og verksmiðjutrolarar.

O.C. Joensen hevur í sínum lagi víst á, at Norðheim er einasta skip, sum dreggjar eftir skeljum, og at eitt størri skip tí ikki tekur nakað frá øðrum. Men tað broytir ikki støðuna hjá fiskimálaráðnum, sum noyðist at halda seg til lógina.

## Lógarbroyting

Fyri einum góðum mánað síðani sendi O.C. Joensen Løgtinginum bræv um málið. Felagið kærdi seg um, at tað hevði ikki fingið nøktandi svar úr fiskimálaráðnum og helt, at har átti málið ongan góðan. Tí heitti felagið á Løgtingið um at broyta verandi lóg, sum tað kann fáa eitt størri skip.

Og kanska er ein broyting á veg. Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, sigur, at hann hevur umhugsað at biðja Fiskirannsóknarstovuna áseta kvotu fyri skeljaveiðina, og at veiðan kann koma undir fiskidagaskipanina. Tá ber til at regulera fiskidagar eftir skipastøddini, og so kann O.C. Joensen fáa størri skip fyri Norðheim, sigur landsstýrismaðurin, sum væntar, at eitt uppskot um broytingar í lógini verður lagt fyri Løgtingið til várs.

Bjørn Kalsø sigur, at talan verður kortini ikki um at loyva stórum skeljatrolarum á Føroyaleiðina sum í áttatiárunum, tí tey skipini vóru alt ov stór, sigur hann.




MASKINMEISTARI TIL NORRÖNU

Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Smyril Line søkir eftir 2. maskinmeistara til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu skipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis størsta skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferðafólk, 800 bilar og manningin, tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

Førleikakrøv til 2. maskinmeistara:
- Fulla maskinmeistaraútbúgving við í minsta lagi STCW áteknaðum vinnubrævi sum skipsmaskinmeistari av 1. stigi
- Heilsu-, sløkkileiðara-, roykkavara- og trygdarprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt og góð samstarvsevnir.

Setanartreytir
Setanartreytir sambært sáttmála millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið.

Vit hugsa okkum, at tú hevur royndir frá størri skipum, men hetta er eingin treyt.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

SMYRIL LINE
Financial Controller
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 10. desembur 2006.

Nærmari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til financial controller á:

+298 34 49 92 ella
controller@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

# Innlendismálaráðið fingið 60 umsóknir um mánaðin

**Í meðal hevur Innlendismálaráðið brúkt ein mánað til at ummæla eina umsókn um uppihalds- og arbeiðsloyvi**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Talið á teimum, sum vilja sleppa til Føroya at arbeiða, hevur ongantíð verið so stórt sum í ár. Frá nýggjárinum til tann 20. oktober fekk Innlendismálaráðið 570 umsóknir um uppihalds- og arbeiðsloyvi.

Talið er nógv størri enn í fjør, tá Innlendismálaráðið fekk umleið 400 umsóknir. Í ráðnum verður sagt, at tann stóri munurin kemst av, at í ár komu nógvar umsóknir frá fólki í sambandi við oljuvinuna. Soleiðis var ikki í fjør.

Ein uppgerð hjá Innlendismálaráðnum vísir, at av teimum 570, sum høvdu søkt um uppihalds- og arbeiðsloyvi, høvdu 71,9 prosent fingið svar tann 20. oktober. Í meðal hevði ráðið brúkt ein mánað til at ummæla umsóknirnar, men nógv tær flestu umsóknirnar blivu avgreiddar innan fyri 14 dagar. Í summum førum tekur tað kortini væl longri tíð at avgreiða eina umsókn, áðrenn hon verður send donsku myndugleikunum, sum eiga ta endaligu avgerðina.

Fyrsta treytin fyri at fáa uppihalds- og arbeiðsloyvi í Føroyum er, at umsøkjarin hevur lyfti frá føroyskum arbeiðsgevara um arbeiði og løn, og at talan er um arbeiði fulla tíð. Tað er t. d. ikki nóg mikið, at arbeiðsgevarin skal brúka útlendska umsøkjaran nakrar tímar í eitt stutt tíðarskeið, tí Innlendismálaráðið vil tryggja sær, at tørvur veruliga er á útlendsku arbeiðsmegini.

Útlendingar, sum fáa uppihalds- og arbeiðsloyvi, fáa loyvið fyri eitt ár ísenn og skulu so søkja aftur.

Innlendismálaráðið hevur eisini fingið nakrar umsóknir í ár frá útlendingum í sambandi við familjusamanføring. Tað er galdandi, tá útlendingur giftist føroyingi, og eitt tílíkt loyvi er eisini bara galdandi eitt ár ísenn fyribils.